# Dagbókin - 10 fl. í Fuglafjarðar skúla skrivar:

## Góða dagbók.

Flokslærari okkara kemur inn í skúlastovuna og spyr okkum , um vit hava hug at skriva eina dagbók til Sosialin. Nøkur svaraðu : " Jú, tað kunnu vit gott", Onnur søgdu: "Jú, kanska, tað hevði verið skeg at skriva eitt brot til Sosialin ."
Eg sjálvur eri við at verða troyttur av at skriva í heila tikið. Vit hava havt fimm stílar - tveir í føroyskum, ein í enskum og tveir í donskum.Harumftamt hava vit havt tvey innføringsørk í støddfrøði - alt innanfyri tríggjar vikur.
Eg gerist tunglyntur av hesum.
Og so er tað veðrið - myrkt, grátt og kalt.Oysandi regnið teir seinastu dagarnar hevur ikki gjørt tað betri
Fyri at koma í betri lag, eri eg saman við familju og vinum, tá hugni eg mær.Tað hjálpir væl.
Á ungdómsmøti fari eg eisini , á legur har man møtir nýggjum fólkum og fær nýggjar vinir - tað styrkir. Ná, eg má skunda mær, eg skal spæla fótbólt nú ............
............Hey aftur ! Venjingin gekk væl, hóast tað var kalt og regnaði illa. Í umklæðingarhølinum var lív í.Ein garrvillur drongur jakstraði ein annan drong út um við einum handklæði - kalt var at standa uttanfyri uttan klæði. Men tað vardi bert stutt , so slapp drongurin inn aftur, og teir gjørdust góðir vinir aftur.
Geisp - geisp ! Nú eri eg troyttur aftaná ta hørðu venjingina , best er at sleppa sær undir dýnuna ....
...... góða nátt !

## Góða dagbók.

Klokkan var farin av sjey, tá fjallmenninir møttust. Veðrið var ikki av tí besta, tvørturímóti, tjúkt og vánaligt sýni. Menn tosaðu um, um tað nú var ráðiligt at fara í slíkum veðri. Men eftir at hava prátað eina løtu, varð hildið, at vit skuldu royna at fara.
Tað gekst væl at reka fyrru gonguna og fáa seyðin í rættina
Næsta gongan var verri at fara eftir, tí mjørkin hevði lagt seg niður á fjøllini, har seyðurin gekk.Men vit býttu okkum upp í bólkar, og so varð herja á. Eg og tveir aðrir ungir dreingir, skuldu ovast at reka , har mjørkin var mestur. Tað kundi verða vandafult at ganga har uppi - ein kundi bert detta einaferð - men vit hava gingið har fyrr, so vit vóru staðkendir.Ovast á fjallinum, vórðu vit so óhepnir at missa ein triðing av seyðinum , men tað var bert tann eina ærin, tí samlaða talið har uppi var trý.
Væl gekst annars at reka og fáa allan seyðin í rættina
Lagið var gott á monnum , tá teir sóu , hvussu væl seyðurin sá út. Eg og systkinabarn mítt hjálptu abba at fáa seyðin í bilhúsið, har hann skuldi flettast.Eftir at hava fingið heita suppu frá ommu, varð farið at fletta. Vit sum yngri vóru hjálptu til at fletta og ganga abba til handa.Flett vórðu 10 lomb , og besta lambið viga 40 pund.
Eg var troyttur av degnum , tá eg fór til hús.Eftir at hava etið nátturða , fór eg í song. Eg sovnaði, so skjótt høvdið kom niðurat.

Góða nátt.

## Góða dagbók

Vit skuldu til Gjáar á seturskúla.
Vit koyrdu leingi til Gjáar, tí vit máttu fara um Eiðisskarð, tí arbeitt varð í Norðskálatunlinum.
Næmingarnir og lærararnir vóru í góðum lag - tað varð sungið og spælt á gittar í bussinum.
Veðrið var av tí besta, sólin skein oman og niðan.
Setursskúlin byrjaði við einari góðari morgunmáltíð.
Eftir at hjava etið, fóru vit at skifta klæði, tí vit skuldu út í ta vøkru náttúruna við Gjógv.
Vit vóru eins og smábørnini, áin dróg okkum til sín - henda vakra áin, ið rennur oman gjøgnum bygdina.Vit lupu í ánna , róðu á flakum, sum vóru í ánni - ja, vit nýttu hvørja løtu.
So komu lærararnir báðir, og róptu, at vit skuldu ein túr niðan í Ambadal. Flest allir næmingarnir fóru niðan í dalin, men nakrir vóru eftir í ánni, har dámdi teimum best.
Túrurin í Ambadali var góður , har var sera vakurt
.
Tá ið vit komu omanaftur, fóru vit at gera døgurða.Tað gekk væl, og døgurðin var góður - øll lótu væl at.
HM - dystirnir vórðu vístir í sjónvarpinum um hetta mundi, og mong av okkum høvdu stóran áhuga fyri fótbólti - og ikki minst lærarar okkara.Sjónvarp høvdu vit tikið við okkum, tað varð sett til, og øll sótu sum á glóðum og hugdu at fótbólti .
Seinni fór vit so út at spæla m.a. hoppaðu vit øll um band - eisini lærararnir - hvør skuldi trúð tí ?
Um midnáttina fóru vit øll til gongu oman í sjalva gjónna - annar lærarin hevði gittarin við sær, og har sótu vit og sungu og hugnaðu okkum . Ein ógloymandi løta.
Um hálvgum tvey - tíðina fóru vit niðan aftur í bygdarhúsið , fóru í soviposarnar og tað gekk ikki long tíð, so vórðu øll sovnað .
Jú, stuttligt og læruríkt er at gera slíkar ferðir.

**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76
100 Tórshavn
Tlf. 31 18 20
Fax 31 47 20
Teldupostur: ph_1@sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller

**Blaðstjórn:**
Ingrid Bjarnastein
Solby Anna Eliasen

<ph_1> er ein partur av Sosialinum annanhvønn mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Lýsingar til <ph_1> skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin áðrenn blaðið kemur út.

Lýsingarnar skulu ikki vera størri enn 254 mm breiðar og 70 mm høgar.






# Vangamyndin: Brandur Enni





| | |
|---|---|
| **Navn:** | Brandur Enni |
| **Aldur:** | 13 ár |
| **Starv:** | Lesandi, sangari |
| **Føðingardagur:** | 05.04.1989 |
| **Hvat vildi tú verða, tá tú vart stórur, tá tú vart lítil?** | Handilsmaður |

**brandur enni hevur seinastu tíðina verið nógv at hoyrt og sæð. konsertir, fløguútgávur og annað hava merkt seinastu tíðina hjá brandi, og hóast hann bert er 13 ára gamal, so er hann longu komin langt innan føroyska tónleikaheimin**

Sjálvur sigur Brandur, at hann hevur altíð sungið nógv. Áðrenn tað varð aktuelt at syngja við millum annað Kulum Rótum, sang Brandur nógv saman við beiggja sínum. Eisini spælir hann kornett, og tað hevur hann gjørt síðani hann byrjaði í fyrsta flokki. Og nú er Brandur eisini farin at spæla klaver.

– Ja, eg eri farin at spæla klaver, men tað havi eg ikki gjørt so leingi. Eg ætli mær at keypa eitt klaver skjótt, og gera eitt sindur meira við tað, og læra meg at spæla ordiliga, soleiðis, at eg kann syngja og spæla í senn, sigur Brandur, sum leggur afturat, at tað er gott at hava eitt akkordljóðføri, sum tú kanst vísa teimum tú arbeiðir saman við, hvat tú vilt við tónleikinum.

Eisini hevur Brandur verið við í bólkinum Faroe Teens. Teir vunnu millum annað árligu Pop Top konsertina í fjør, og sluppu tí at vera við á ólavsøkukonsertini eisini.

– Ætlanin við Faroe Teens var at hava ein ungdómsbólk, sum dugdi at syngja og spæla væl. Eg haldi sjálvur, at tað var sera gott at spæla saman við teimum, tí har fekk mín rødd nógv størri avbjóðingar, enn hon hevði fingið áður.

## Ein stjørna

Hóast hann bert er 13 ára gamal, so hevur hann longu fingið eitt slag av stjørnustatus bæði millum ungar gentur og dreingir í Føroyum. Men hvat sigur Brandur sjálvur til at vera ein stjørna?

– Eg haldi, tað er stuttligt, og eg njóti tað so leingi tað varðar, sigur Brandur.

Enn er skúlin hjá Brandi ikki liðugur, og við allari venjingini og øllum tí, sum hann hevur at gera, kann tað tykjast eitt sindur ringt at fáa alt at hanga saman.

– Nú gongur alt fínt, og kabalin gongur upp. Eg eri norðanfyri um vikuskiftini, har eg venji og geri studioupptøkur. Viðhvørt missi eg nakrar dagar í skúlanum, sigur unga stjørnan.

Brandur sigur, at hann viðhvørt kemur eitt sindur afturút, men hann megnar sum oftast at koma inn aftur, sjálvt um tað kanska til tíðir er tungt

– Sjálvt um eg ikki havi verið í skúla líka nógv sum mínir floksfelagar, so havi eg lært okkurt annað, har eg havi verið, meðan teir hava verið í skúla, greiðir Brandur frá.

– Eg haldi, at eg havi upplivað eins nógv og teir, og eg haldi, at mín sjónarringur er eins stórur og teirra.

Tá ein er so ungur sum Brandur er, so er tað sjálvsagt, at nógv vaksin eru um hann, tá hann er í studio, til konsertir og annað. Men Brandur letur væl at, sjálvt um hann ikki er umringaður av javnaldrum allatíðina.

– Mær hevur altíð dámað væl at vera saman við vaksnum fólkum. Tey hava nógvar royndir, og eg kann læra nógv av teimum. Eg sigi ikki, at mær dámar betri vaksin fólk enn mínar javnaldrar, men í mínari verð er tað pláss fyri báðum. Eg eri nú farin at spæla saman við gittaristinum, Benjamin Petersen, og tað eri eg sera glaður fyri. Vit báðir vóru eisini við í bólkinum Faroe Teens. Tá tað eru smærri tiltøk fara vit báðir út og spæla einsamallir.

Framtíðin er greið. Brandur vil sleppa út í verðina við tónleiki sínum.

– Tað eru ógvuliga góðir tendensir uttanlands, og har er nógv áhugavert at fara eftir, umframt, at har eru nógv fleiri møguleikar, hvat tónleikinum viðvíkur.

Men sjálvt tey flestu halda, at Brandur dugir ógvuliga væl at syngja og dugir væl at framføra, so er kritikkur eisini nakað, sum hann fær.

– Eg taki onki sum negativan kritikk. Fólk vilja bara hjálpa, og tá eg hyggi eftir konsertunum upptiknar, so síggi eg tað, sum var gott og tað, sum eg kundi gjørt betur, sigur Brandur.

Men sjálvur metir hann, at hann hevur ment seg nógv síðani hann av fyrstan tíð byrjaði.

– Eg eri ikki bangin fyri pallinum. Kanska eg var tað eitt sindur í byrjanini, men nú veit eg betur, hvussu eg skal brúka hann, sigur Brandur Enni at enda.